## Jubileums- og jólakonsert leygardagin

Kristiliga Sangkórið hevur í ár 55 ár á baki og hevur síðani tá verið virkið. Nú leygardagin verður fer kórið at framføra eina sangskrá í Kommunuskúlanum, sum verður partvís ein jubileumskonsert við afturlítandi tilfari og ein jólakonsert við yngri og eldri jólaløgum. Konsertin verður í Kommunuskúlanum leygardagin kl. 16.

## Jólamarknaður umborð á Norrönu

Týsdagin og mikudagin í næstu verður skipað fyri einum hugnaligum jólamarknaði umborð á Norrönu, meðan hon liggur við bryggju í Havn. Her verður ymiskt at fáa til keyps, eins og kokkurin umborð fer at borðreiða við eini serstakari matskrá til tey vitjandi. Nógvur tónleikur verður umborð, gyklari fer at vitja og børnini fáa andlit síni málað. Hetta er fyrstu ferð at skipað verður fyri slíkum jólamarknaði umborð, men óhugsandi er ikki at hetta fer at endurtaka seg. Tað er ókeypis atgongd.

# Fjølmiðlafólk undrast hóttanir hjá kringvarpsstjóra

**Fakfelagið hjá miðlafólkum í Føroyum, Føroysk Miðlafólk, undrast yvir hóttanirnar hjá Anniku Mittún Jacobsen, stjóra í Kringvarpinum. –Útsagnirnar skap ein ótryggleika, sum er øgiliga óheppin fyri okkara limir, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í Føroysk Miðlafólk**

MIÐLAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein stórur partur av starvsfólkunum í Kringvarpi Føroya eru limir í felagnum Føroysk Miðlafólk. Felagið, ið varðar av flestu fólkunum, ið verða ávirkaði av hóttanini hjá kringvarpsstjóranum Anniku Mittún Jacobsen, undrast stórliga yvir tær útsagnirnar, ið kringvarpsstjórin er komin við.

- Tað verða nú neyvan okkara limir, ið verða uppsagdir, verða Dagur & Vika, 3-2 og gudstænasturnar niðurlagdar. Men verða hesar deildirnar niðurlagdar, skulu hesi fólkini umrokerast inni í Kringvarpinum, og bara tann ótryggleikin, at tú ikki veit hvar tú skal arbeiða, tá tú kemur til arbeiðis, er øgiliga óheppin, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í felagnum Føroysk Miðlafólk.

### Eru á varðhaldi

Fyribils ger felagið einki við støðuna, men tey fylgja gongdini neyvt. Áhugamálið hjá felagnum er at limirnir hava so optimalar arbeiðsumstøður sum gjørligt, og tí fara tey neyvan at sita tigandi og hyggja at, so leingi teirra limir ongan hóming hava av, hvar teir flóta.

- Vit eru sjálvandi til reiðar at taka neyðugu stigini, gerst tað neyðugt, men nú mugu vit fyrst fáa at síggja hvat hendir víðari. Tað snýr seg í veruleikanum um respektina fyri fakligheitini hjá fólkunum. Mann kann ikki bara vænta, at mann púra óproblematiskt kann flyta fólk runt á deildunum í Kringvarpinum, vísir Anna V. Ellingsgaard á.

### Ógjørligt at kvetta tíðindini

Sambært Annu V. Ellingsgaard er tað ein sera óheppin útsøgn at koma við, at tað eru tíðindini, ið skulu skerjast burtur.

- Tað undrar meg at knívurin opinbart skal setast júst har. Tað er óheppið í allar mátar í mun til tann leiklut, ið ein so sterkur stovnur sum Kringvarp Føroya hevur sum vaktarhundur hjá fólkaræðinum, og sum spælir ein so týðandi leiklut í okkara fólkaræði. Tað er sera vandamikið at skerja í fólkaræðisligu skylduni, sum ein slíkur miðil hevur, greiðir Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í Føroysk Miðlafólk, frá.

Í roynd og veru ber tað ikki til hjá Kringvarpinum at niðurleggja Dag & Viku, tá hetta er ein av teimum ovastu public service skyldunum hjá Kringvarpinum, saman við barnasendingum og føroyskum tilfari yvirhøvir.

- Kringvarpið hevur eina public service skyldu, og saman við eini umráðandi málsligari skyldu, eru hesi kjarnuviði í public service skylduni hjá Kringvarpinum, sigur Anna V. Ellingsgaard.

### Undarligt politiskt spæl

Eitt tað, ið undrar forkvinnuna í Føroysk Miðlafólk mest, er at Mentamálaráðið alla tíðina spælir bóltin yvir aftur í banan hjá Kringvarpinum.

- Í stóran mun er public service hugtakið eitt politiskt ideal og eitt politiskt krav um upplýsing til fólkið. Tá man setur eitt politiskt krav, eigur man eisini at kunna fíggja tað. Tað undrar meg at eingin hevur gjørt sær ein tanka um, hvønn leiklut hasin stovnurin hevur, og eg meti at man eigur at gera sær nakrar álvarlsigar tankar um tað. Eg gangi eisini bara út frá at mentamálaráðharrin hevur gjørt sær nakrar tankar um, hvat eigur at standa í nýggju public service avtaluni, sum verður gjørd við Kringvarp Føroya, sigur Anna V. Ellingsgaard, forkvinna í felagnum Føroysk Miðlafólk.

### Kringvarpsstjóri harmast eisini

Stjórin í Kringvarp Føroya, Annika Mittún Jacobsen, harmast um íkomnu støðuna.

*Hví brúka tit m.a. Dag og Viku sum hóttan, tá Public Service skyldan ger, at tit ikki hava loyvi at niðurleggja sendingina?*

- Um tað er tilfeldið, so mugu vit fyrihalda okkum til tað. Tað eru nógv ting í kringvarpslógini, sum vit ikki kunnu, og tað eri eg kedd av at vit ikki klára. Men hinvegin fært tú ikki fólk at arbeiða uttan løn, leggur Annika Mittún Jacobsen dent á.

Sambært henni var hatta bert ein kunning til fíggjarnevndina

*Átti tú ikki at vita tað, áðrenn tú lagnaði út við hasum útsagnunum?*

- Tað at tað verður blást upp, er nakað, ið miðlarnir gera. Hvat hevði tú gjørt, um tú ikki hevði havt ráð at fylgja lógini? Vit vilja sjálvandi gera alt fyri at halda lógina, staðfestir Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarp Føroya.



- Tað undrar meg, at knívurin opinbart skal setast júst har. Tað er óheppið í allar mátar í mun til tann leiklut, ið ein so sterkur stovnur sum Kringvarp Føroya hevur sum vaktarhundur hjá fólkaræðinum, og sum spælir ein so týðandi leiklut í okkara fólkaræði

## Smyril Line fær danskan nevndarformann



Smyril Line fær ein tungvektara í danskari sjóvinnu sum nýggjan nevndarformann. Fyrrverandi stjórin hjá Torm reiðarínum skal standa á odda fyri nevndina hjá Smyril Line. Mánadagin hevur Smyril Line aðalfund, og tá verður nýggj nevnd vald. Ein av limunum, sum landsstýrið fer at velja í nevndina, er fyrrverandi stjórin í reiðaríinum Torm, Klaus Kjærulff. Sum skilst skal hann verða nevndarformaður í Smyril Line. 56 ára gamli Klaus Kjærulff verður roknaður sum ein profilur í danskari sjóvinnu, og hann hevur í 33 ár starvast hjá Torm. Seinastu átta árini var hann stjóri, men valdi eftir egnum ynski at gevast fyri trimum mánaðum síðani. Stjórin í Supply Service í Lorvík, Jens Meinhard Rasmussen, verður eftir øllum at døma eisini ein av nevndarlimunum. Rás2 skilir, at landsstýrið arbeiðir við at seta kvinnur í nevndina eisini.